**Býráðsfundur 29.01.2024 kl. 18.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhølið | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**Mál til viðgerðar:**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 1/2024 – Møblar til nýggju alis- og evnafrøðistovuna | ALMENT |
| Mál nr. 2/2024 – Umvæling í svimjihylinum | ALMENT |
| Mál nr. 3/2024 – Vindeygu til ítróttarhúsið á Svangaskarði | ALMENT |
| Mál nr. 4/2024 – Broyting av byggisamtykt – Eysturlund | ALMENT |
| Mál nr. 5/2024 – Broyting av byggisamtykt á Havnalagnum | ALMENT |
| Mál nr. 6/2024 – Broyting av byggisamtykt matr. nr. 264i | ALMENT |
| Mál nr. 7/2024 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 8/2024 – Umsókn um sundurbýti matr. nr. 449 | ALMENT |
| Mál nr. 9/2024 – Umsókn um marknaumskipan matr. nr. 285d | ALMENT |
| Mál nr. 10/2024 – Umsókn um marknaumskipan matr. nr. 374 | ALMENT |
| Mál nr. 11/2024 – Heimildir hjá stovnsleiðarum | ALMENT |
| Mál nr. 12/2024 – Umsókn um stuðul til spæliplássið á Gadd | ALMENT |
| Mál nr. 13/2024 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 14/2024 – Ársroknskapur – Kongshavnar Havn | ALMENT |

**Mál nr. 1/2024 – Møblar til nýggju alis- og evnafrøðistovuna ALMENT**

J.nr.: 1901-1-2023

Í samband við umvælingina av Alis- og evnafrøðistovuni er neyðugt at keypa innbúgv til stovuna.

Nes kommunu hevur fingið tilboð frá ST-Skoleinventar ígjøgnum ráðgeving frá Teknistovuni.

Viðheft er tilboð, sum er uttan frakt og uppsetan.

Tillagingar kunnu koma í prísinum, tá ið innbúgvið er endaliga liðugt teknað og góðkent av skúlanum. Umboð fyri skúlan og Teknistovuna samskifta við veitaran um smærri rættingar í innbúgvsinnrættingini. Endaligur prísur uppá verkætlanina viðv. møblunum fyriliggur væntandi til fíggjarnevndarfundin.

**Á fundi tann 17.01.2024, mælir Tekniska nevnd til at taka undir við ætlanini og at neyðuga fíggingin verður játtað í fíggjarnevndini.**

Dagført tilboð er komið frá ST-Skoleinventar. Tá er prísurin uppá borð til næmingarnar tikin úr tilboðnum, tí at ynski er um at biðja um tilboð uppá borð og stólar frá øðrum veitarat. Tilboðið er umbiðið sambært ráðgeving frá Teknistovuni í Gøtu og í samráð við lærarar í Tofta skúla.

Tilboðið frá ST-Skoleinventar er viðheft.
Harafturat kemur kostnaður fyri frakt. Eisini hevur Teknistovan gjørt eina meting av kostnaðinum fyri uppseting.

Hetta gevur ein samlaðan kostnað uppá kr. 507.828 v/mvg á 6,25%.

**Á fundi, tann 23.01.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka av tilboðunum fyri ein samlaðan kostnað á kr. 507.828 v/ mvg á 6,25% og at fíggingin verður tikin av stovninum “Nýggi skúli íløga”/Alis- og evnafrøðistovan – Innbúgv.**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 2/2024 – Umvæling í svimjihylinum ALMENT**
J.nr.: 1901-1-2023

Í samband við umvæling av Alis- og evnafrøði stovuni í Tofta skúla hevur verið neyðugt at tøma svimjihylin. Tá hylurin varð tømdur gjørdist greitt, at fleiri fukur eru farnar í hylinum. Tekniska deild metti, at tað ikki var forsvarligt at lata hylin uppaftur, uttan so, at umvælingin varð gjørd beinanvegin.

Nes kommuna hevur fingið tilboð uppá at umvæla fukurnar frá Flísamúraranum.

Somuleiðis er staðfest, at frárenslið (spýtirennan) frá hylinum er ótætt. Tað er eitt arbeiðið sum kann bíða nakað, men tað er ikki ráðiligt at bíða verður ov leingi við at tetta lekan.

**Á fundi tann 17.01.2024, mælir Tekniska nevnd til at taka undir við tilboðnum**

**frá Flísamúraranum og harafturat ynskir nevndin at Tekniski leiðarin kannar, hvør loysn kann brúkast fyri at fáa frárenslið (frá spýtirennuni) tætt, og hvat ein slík loysn kostar.**

Fríggjadagin 19. januar 2024 var fakmaður frá Univice í Tofta skúla saman við umboðum fyri kommununa.Tosað varð um møguleikan at leggja glasfipur á fyri at fáa frárenslið (frá spýtirennuni) tætt. Univice kemur við einum tilboðið áðrenn fíggjarnevndarfundin.

Tilboð eru síðan komin frá Univice og eisini frá Flísamúraranum í samband við at tetta frárensli (spýtirennuna). Tað merkir, at samlaði kostnaðurin viðv. óvæntaðu umvælingunum, sum talan er um í svimjihylinum, eru kr. 329.753 u/mvg og kr. 350.363 v/mvg á 6,25%.

**Á fundi, tann 23.01.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka av tilboðunum frá Flísamúraranum og Univice á tilsamans kr. 350.363 v/mvg og at fíggingin verður tikin av stovninum "Nýggi skúli íløga"/Alis- og evnafrøðistovan – Innbúgv".**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 3/2024 – Vindeygu til ítróttarhúsið á Svangaskarði ALMENT**

J.nr.: 2006-3-2023

Ætlanin er at skifta restina av gomlu vindeygunum í Ítróttarhúsinum á Svangaskarði í 2024. Tveir arbeiðstakarar vórðu bodnir á ástaðarfund, og síðani at geva tilboð uppá arbeiðið.

Tá ið tilboðini skuldu verða inni 16.01.24 kl. 12, høvdu báðir arbeiðstakararnir givið tilboð.

Tilboðini eru soljóðandi:

Tilboð 1: kr. 320.000 v/mvg ella kr. 272.000 v/ 6,25% mvg

Tilboð 2: kr. 456.250 v/mvg

Tekniski leiðarin mælir til, at kommunan fer í samskifti tilboðsgevara 1, ið er Allan við Rætt, um møguligan arbeiðstakarasáttmála fyri arbeiðið.

**Á fundi tann 17.01.2024, mælir Tekniska nevnd til at taka av tilboðnum frá Allan við Rætt á kr. 320.000 v/mvg og at Tekniski leiðarin fer í samráðingar við Allan um tíðarætlan o.s.v.**

**Á fundi, tann 23.01.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd og at taka av tilboðnum á kr. 272.000 v/6,25% mvg og at fíggingin verður tikin av stovninum "Svangaskarð ítróttarøki".**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

<u>**Mál nr. 4/2024 – Broyting av byggisamtykt – Eysturlund ALMENT**</u>
<u>J.nr.: 1206-17-2023</u>

Í teldubrævi dagfest, tann 08.11.2023, heitir H.E. vegna EFFO á kommununa um at broyta byggisamtyktina, so byggisamtyktin fyri Nes kommunu loyvir ætlaðu orkuframleiðsluútbyggingina sum snýr seg um at seta upp eina vindmyllulund m.a. yviri í Nev.
EFFO hevur upplýst kommununi, at teir hava verið í samskifti við bæði Búnaðarstovuna og festarin, sum taka undir við ætlanini.

Tekniski leiðarin mælir til at lýsa økið sum K øki.

Nýggja K-økið hevur fylgjandi ásetingar:

<u>Ásetingar fyri K-økini</u>.

1) Økið verður lagt til vindmyllulund, og aðrar orkuframleiðslubyggingar.
2) Orkuframleiðslubyggingarnar kunnu bert fremjast eftir góðkendari ætlan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki.
3) Loyvi kann gevast at byggja vegir, hús, skýli ella aðra tekniska útgerð, ið krevst til raksturin av eini frammanundan góðkendari orkuframleiðslubygging.
   Tílíkar byggingar, ið náttúrliga hoyra til slíkar orkuframleiðsluútbyggingar, skulu tillagast landslagi og lendi soleiðis, at teir í minst møguligan mun lýta náttúrliga landslagi í økinum.
4) Nærri ásetingar fyri K-økini kunnu verða gjørdar í serstakari byggisamtykt.

**Á fundi tann 17.01.2024 mælir Tekniska nevnd at taka undir við at broyta byggisamtyktina sum nevnt omanfyri.**

**Elin á Torkilsheyggi var úti undir viðgerðini.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Elin á Torkilsheyggi var úti undir viðgerðini.**

**Mál nr. 5/2024 – Broyting av byggisamtykt á Havnalagnum ALMENT**

J.nr.: 1503-2-2023

Ætlaða broytingin hevur við sær, at økið fer frá at verða D øki til at verða D1 øki. Nýggja D1 økið hevur fylgjandi ásetingar:

Øki D1:

a) Økið verður lagt av til havnaendamál og virki, ið hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey, bilstøðlar o.t.
b) Byggistigið fyri havnaøkið sum heild má ikki fara upp um 0,5.
c) Rúmmát av húsinum má ikki fara upp um 3 m3 fyri hvønn m2 av grundstykkinum.
d) Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu vera hægri enn 10 m yvir liðugt kajdekk (miðal við húsahornini).
e) Bygging má ikki verða sett nærri bryggjutrom enn 4 m, ella nærri markið enn 5 m, minsti fráleiki millum bygningar 10 m.
f) Á hesum økinum er ikki loyvt at innrætta bústaðir.
g) Býráðið kann tó geva loyvi til, at partur av eini bygging kann verða hægri enn teir ásettu 10 m, eitt nú tekniskur útbúnaður ella líknandi. Hetta er galdandi fyri øll D økini uttan D3.

**Á fundi, tann 17.01.2024, mælir Tekniska nevnd til at taka undir við at broyta byggisamtyktina sum nevnt omanfyri.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 6/2024 – Broyting av byggisamtykt matr. nr. 264i ALMENT**

J.nr.: 1203-2-2023

Ætlanin er at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 264i, so at tað verður broytt frá A2 øki til A3 øki.

Nýggja A3 økið hevur fylgjandi ásetingar:

Øki A3:

a) Økið verður nýtt til miðstaðarøki, t.e. til tænastumerktar fyritøkur sum umsiting, handlar, skrivstovur, heilsubótastovu, stovnar, fornminnir, íbúðir, raðhús, randarhús og líknandi.
b) Útstykking kann bert fara fram eftir ætlan, sum fevnir um eitt náttúrliga avmarkað øki, sum býráðið góðkennir.

c) Størst loyvda byggistig er 0,6
d) Hægsta loyvda útsíðuhædd (fasaduhædd) móti vegi (vestursíðan av bygningunum) til yvirgrindina er 17 m.
e) Hægst loyvda hædd frá vegi til hægsta punkt á tekju er 17 m.
f) Nýtingarstigið fyri øki A3 kann ikki fara uppum 1,2.

**Á fundi, tann 17.01.2024, mælir Tekniska nevnd til at taka undir við at broyta byggisamtyktina sum nevnt omanfyri.**

**Dakko Petersen var úti undir viðgerðini.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Dakko Petersen og Rannvá í Túni Petersen vóru úti undir viðgerðini.**

**Mál nr. 7/2024 – AFTURLATIÐ**

**Mál nr. 8/2024 – Umsókn um sundurbýti matr. nr. 449 ALMENT**
J.nr. 1205-1-2024

Í samband við umsókn um sundurbýti av matr. nr. 449 er Nes kommuna biðin um ummæli.

Ætlanin er at frábýta 430 m2 ovast á verandi stykkið til eitt grundøki til sethúsabygging, sambært viðlagda korti. Sundurbýtið er góðkent av skiftirættinum, sum í løtuni varðar av ognini.

**Á fundi tann 17.01.2024, mælir Tekniska nevnd til at loyva sundurbýtinum.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 9/2024 – Umsókn um marknaumskipan matr. nr. 285d ALMENT**
J.nr.: 1205-10-2023

Í teldubrævi dagfest, tann 07.12.23, heitir Umhvørvisstovan á Nes kommunu um at ummæla marknaumskipan millum matr. nr. 408b og 285d.

Ætlanin er, at matr. nr. 285d fær 2 metrar afturat norðeftir úr markinum frá matr. nr. 408b.

**Á fundi tann 17.01.2024, mælir Tekniska nevnd til at loyva marknaumskipanini.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 10/2024 – Umsókn um marknaumskipan matr. nr. 374 ALMENT**
J.nr.: 1205-2-2024

Í teldubrævi dagfest, tann 11.01.24, heitir Umhvørvisstovan á Nes kommunu um at ummæla marknaumskipan millum matr. nr. 374 og 375.

Ætlanin er, at matr. nr. 374 fær 21,9 m2 afturat frá matr. nr. 375, so at markið verður rættað upp.

**Á fundi tann 17.01.2024, mælir Tekniska nevnd til at loyva marknaumskipanini.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 11/2024 – Heimildir hjá stovnsleiðarum ALMENT**
J.nr.: 1101-2-2024

Eftir verandi skipan hevur Trivnaðarnevndin setanarmyndugleikan í mun til starvsfólkini á stovnunum. Hetta merkir, at Trivnaðarnevndin bæði setir starvsfólk, uppsigur starvsfólk og viðger farloyvi eftir galdandi mannagongdum hjá kommununi.

Umsitingin hevur umrøtt mannagongdina saman við leiðaranum í Barnagarðinum og leiðaranum í Frítíðarskúlanum sum meta, at hetta er ein óneyðuga tung skipan. Gott hevði verið, um stovnsleiðararnir sjálvir kundu yvirtikið hendan myndugleika.

Umsitingin mælir til, at setanarmyndugleikin verður lagdur út til stovnsleiðararnar sjálvar, so at stovnsleiðararnir seta, uppsiga og viðgera farloyvir. Tó við tí undantaki, at Trivnaðarnevndin setir leiðarar og varaleiðarar.
Eisini verður mælt til, at stovnsleiðararnir kunna Trivnaðarnevndina um setanir, við jøvnum millumbili, tá ið setanir hava verið.

Trivnaðarnevndin hevur framhaldandi evsta myndugleikan, og stovnsleiðarar kunnu venda sær bæði til nevndina, borgarstjóran og umsitingina um nakað ivamál er, ella um tørvur er á sparring.
Trivnaðarnevndin, og í evsta føri býráðið, verða kærumyndugleiki á økinum.

**Á fundi tann 16.01.2024 mælir Trivnaðarnevndin til at taka undir við, at stovnsleiðararnir fáa leiðsluheimild, eins og nevnt omanfyri. Somuleiðis verður mælt til at Trivnðarnevndin fær kunning, er til at heita á, og er kærumyndugleiki á økinum.**

**Á fundi, tann 23.01.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Trivnaðarnevndini.**

**Tilmælini hjá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 12/2024 – Umsókn um stuðul til spæliplássið á Gadd ALMENT**
J.nr.: 2001-1-2024

Í teldubrævi dagfest, tann 02.01.24, søkir K.J. vegna íbúgvararnar, um stuðul á kr. 25.000 til spæliplássið á Gadd fyri 2024.

Hann vísir á, at nógv er gjørt fyri at betra um økið, og í ár er ætlanin at brúka fíggingina uppá at keypa skreiðibreyt og møguliga borð, benkur, máling o.a. alt eftir, hvussu langt pengarnir strekkja.

Eisini verður í umsóknini heitt á kommununa um at raðfesta arbeiðið at avslutta framvið vegnum frá Kvíggjarvegi til Gaddaveg og um Kvíggjarheygg við gonguteigum, laðingum og planting í 2024.

**Á fundi, tann 16.01.2024, mælir Mentanarnevndin til at játta stuðul á kr. 25.000 til spæliplássið og at kunna um, at peningur er avsettur til liðugtgerð av gonguteigum á Kvíggjarvegnum í 2024.**

**Á fundi, tann 23.01.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Trivnaðarnevndini og at fíggingin kr. 25.000 verður tikin av stovninum "Sparkivallir og spælipláss".**

**Tilmælini hjá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 13/2024 – AFTURLATIÐ**

**Mál nr. 14/2024 – Ársroknskapur – Kongshavnar Havn ALMENT**
J.nr.: 1107-1-2024

Ársroknskapurin hjá Kongshavnar Havn er komin til ummælis hjá kommununi.

**Rakstrarroknskapur**

| | **Nota** | **Ætlan 2022** | **2022** | **2021** |
|---|---|---|---|---|
| Havnagjøld | 1 | 1.669.500 | 1.711.433 | 1.783.496 |
| **Inntøkur Brutto** | | **1.669.500** | **1.711.433** | **1.783.496** |
| Uppkrevingarkostnaður | 2 | - 417.375 | - 427.858 | - 445.874 |
| **Inntøkur netto** | | **1.252.125** | **1.285.575** | **1.337.622** |
| Fyrisiting | 3 | - 97.500 | - 102.465 | - 128.061 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | | - 2.000 | - 2.555 | - 3.353 |
| Marknaðarføring | | - 90.000 | 0 | - 90.000 |
| Umhvørvi (Ljóðdálking) | | - 25.000 | 0 | 0 |
| Fishing for litter | | 0 | 0 | 0 |
| Rudding | | - 70.000 | - 90.000 | - 90.000 |
| **Úrslit áðrenn rentur** | | **967.625** | **1.088.555** | **1.026.208** |
| Rentuinntøkur og tílíkt | | 0 | 0 | 0 |
| Rentuútreiðslur | | - 15.000 | - 18.722 | - 22.133 |
| **Ársins úrslit** | | **952.625** | **1.069.833** | **1.004.075** |

**Fíggjarstøða**

| | **31.12.2022** | **31.12.2021** |
|---|---|---|

| | | | |
|---|---|---|---|
| Áogn | | 368.695 | 427.934 |
| Tøkur peningur | 4 | 3.293.203 | 2.858.036 |
| **Ogn í alt** | | **3.661.898** | **3.285.970** |
| Eginpeningur | | 4.352.371 | 4.195.146 |
| Goldið út av inniogn | 5 | - 696.736 | - 912.609 |
| **Eginpeningur í alt** | | **3.655.635** | **3.282.537** |
| **Skuld í alt** | | **6.263** | **3.432** |
| **Eginpeningur, skuld og avsetingar í alt** | | **3.661.898** | **3.191.347** |

**Á fundi, tann 23.01.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við roknskapinum hjá Kongshavnar Havn fyri 2022 so sum hann er uppsettur.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**